UTTANRÍKIS- OG MENTAMÁLARÁÐIÐ

# Starv sum fyrstilærari í Skálavíkar skúla

## Uttanríkis- og mentamálaráðið sóknast eftir dugnaligum leiðara, ið hevur áhuga fyri námsfrøðiligari og fakligari menning og hegni at átaka sær leiðslustarv í fólkaskúlanum

Starvið sum fyrstilærari í Skálavíkar skúla verður lýst leyst til setanar frá 1. august 2020. Í Skálavíkar skúla eru 9 næmingar í 1. - 5. árgangi innskrivaðir næsta skúlaár. Ein lærari umframt fyrstalæraran starvast í skúlanum.

**Um starvið**
Fyrstilærarin hevur fyrisitingarligu og námsfrøðiligu leiðsluna og ábyrgd av virksemi skúlans og fíggjarstýringini. Høvuðsuppgávurnar eru:

- at standa á odda fyri fakligari og námsfrøðiligari menning
- at fremja eina mennandi starvsfólkaleiðslu og virka fyri, at starvsfólk skúlans hava umstøður fyri fakligari menning
- at virka fyri trivnaði og góðum samstarvi við atliti at næmingum og starvsfólki skúlans
- at skapa virðing fyri skúlanum og umstøður hjá tí einstaka fyri ávirkan og samábyrgd
- at fremja gott samstarv millum skúla og heim og eggja næmingum og foreldrum at fáa sum mest burtur úr skúlagongdini bæði fakliga og sosialt.

**Førleikakrøv**

- Umsøkjarar skulu hava útbúgving sum fólkaskúlalærari og starvsroyndir í fólkaskúlanum.
- Tað er ein fyrimunur at hava leiðsluroyndir og skeið ella útbúgving innan leiðslu.
- Harumframt skulu umsøkjarar hava áhuga fyri avbjóðingum og førleika at taka neyðugar avgerðir.

**Setanarviðurskifti**
Setanarøkið er undir Uttanríkis- og mentamálaráðnum við fyribils tænastu í Skálavíkar skúla. Tann, ið settur verður, eigur at tola broytingar í starvinum. Starvið er flokkað í lønarflokkunum 31.2 og 31.3 sambært avtalu millum Fíggjarmálaráðið og Føroya Lærarafelag.

**Umsóknir**
Umsókn saman við avriti av læraraprógvi, C.V. og møguligum viðmælum skal verða Uttanrikis- og mentamálaráðnum í hendi í seinasta lagi 11. juni 2020.

**Umsóknin verður stílað til:**
Uttanríkis- og mentamálaráðið
Tinghúsvegur 7
Postrúm 3279, 110 Tórshavn
ella við t-posti**:** ummr@ummr.fo

Tey, ið ynskja fleiri upplýsingar um starvið, kunnu ringja ella skriva til Jenny Lydersen, undirvísingarleiðara, tlf. 555044, t-postur: jenny@ummr.fo.

***Uttanríkis- og mentamálaráðið** hevur sum høvuðsuppgávu at fyrisita undirvísingarmál, mentamál, gransking og uttanríkismál. Eisini eru uppgávur viðvíkjandi kirkju, loftmiðlum og frítíðarvirksemi.*